




# ungdómurin er kræsin og krevjandi

Í løtuni standa barnasendingarnar í fremstu røð, men at gera ungdómssendingar liggur langt frammi í huganum hjá sjónvarpinum.

– Prix Føroyar kemur á skránna fyrst í januar mánað, men í løtuni eru hvørki orka ella peningur til at gera ungdómssendingar. Um vit fáa møguleikan til tess, so vilja vit fegin gera eina fasta føroyska ungdómssending.

Botnurin gjørdist mestsum til eina ungdómssending, tí tað vóru mest ungdómar, sum hugdu eftir henni, og vertirnir ræettaðu seg eisini meira ímóti ungdóminum enn nøkrum øðrum.

– Vit royna at hava nakrar sendirøðir til ung, og nakað av ungdómstilfari frá DR verður sent leygardag seinnapartar. Ungdómurin í Føroyum er kræsin og krevjandi, og tí koma vit okkum ikki at fara út við nøkrum, uttan vit vita áðrenn, at tað fer at bera seg. Kappingin er hørð, og tað eru so nógvar aðrar sjónvarpsrásir at velja ímillum.



Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri

Tey, sum hyggja eftir Sjónvarpi Føroya, hava helst uppdagað, at tað smáligt við tilfari til ung.

